## Cissé breyt beinið

Í vinardystinum hjá Fraklandi móti Kina í gjárkvøldi, varð Liverpool framherjin Djibrill Cissé ógvusliga tacklaður í fyrra hálvleiki. Seinni á kvøldi kundi staðfestast, at talan var um beinbrot, og tí verður framherjin ikki partur av endaliga HM-hópinum hjá Fraklandi.

Enn er ikki greitt, hvør avloysarin hjá Cissé verður, men favorittar til plássið er Nicolas Anelka úr Fenerbache og Ludovic Giuly úr Barcelona.

-mørk



## Oddsini frá Dansk Tipstjeneste

***Hvør fer víðari úr bólki G***

| | |
|---|---|
| Frakland & Sveis | 1,60 |
| Frakland & Suðurkorea | 2,50 |
| Frakland & Togo | 7,00 |
| Sveis og Suðurkorea | 8,50 |
| Sveis & Togo | 30,00 |
| Suðurkorea & Togo | 60,00 |

## Bólkur G

### FRAKLAND

**Málverjar**
Mickael Landreau
Fabian Barthez
Gergory Coupet

**Verja**
Jean Alain Boumsong
Eric Abidal
William Gallas
Mikael Silvestre
Liliam Thuram
Gael Givet
Willy Sagnol
Pascal Chimbonda

**Miðvøllur**
Patrick Vieira
Claude Makelele
Florent Malouda
Vikas Dhorasoo
Zinedine Zidane
Alou Diarra
Franck Ribery

**Álop**
Djibril Cissé
Sylvain Wiltord
Thierry Henry
Louis Saha
Davic Trezeguet

### SUÐURKOREA

**Málverjar**
Yong-Dae Kim
Young-Kwang Kim
Woon-Jae Lee

**Verja**
Young-Chul Kim
Jin-Chui Choi
Jin-Kyu Kim
Youn-Pyo Lee

**Miðvøllur**
Dong-Jin Kim
Nam-Il Kim
Do-Heon Kim
Eul-Young Lee
Ji-Hoon Baek
Kyung-Ho Chung
Ho Lee
Sang-Sik Kim
Ghong-Gug Song
Won-hee Cho

**Álop**
Ji-Sung Park
Jung-Hwan Ahn
Chu-Young Park
Ki-Hyen Seol
Chun-Soo Lee
Jae-Jin Cho

### SVEIS

**Málverjar**
Pascal Zuberbuhler
Diego Benaglio
Fabio Coltori

**Verja**
Johan Djourou
Ludovic Magnin
Philippe Senderos
Stephane Grichting
Cristoph Spycher
Patrick Müller
Philipp Degen

**Miðvøllur**
Xavier Margairaz
Johann Vogel
Ricardo Cabanas
Raphael Wicky
Daniel Gygax
David Degen
Blerim Dzemalli
Tranguillo Barnetta
Valon Behrami
Hakan Yakin

**Álop**
Alexander Frei
Marco Streller
Mauro Lustrinelli

### TOGO

**Málvejar**
Numini Tchagnirou
Kossi Agassa
Kodjovi Obilale

**Verja**
Dare Nibombe
Jean-Paul Abalo
Massamasso Tchangai
Eric Akoto
Ludovic Assemoassa
Karim Guede
Assimiou Toure

**Miðvøllur**
Yao Aziwonou
Moustapha Salifou
Kuami Agboh
Thomas Dossevi
Maman Cherif-Toure
Alaixys Romao
Junior Senaya
Affo Erassa

**Álop**
Emmanuel Adebayor
Robert Malm
Richmond Forson
Adekanmi Olufade
Kadar Mohammed

# Seinasti valsur við ZZ



*Fagnaðurin var øgiligur, tá Zidane í fjør heyst gjørdi come-back á franska landsliðnum. Fyrsti týðandi dysturin í so máta var móti Føroyum í dystinum, sum Frakland vann 3-0*
*Mynd: Álvur*

**Zinedine Zidane takkar endaliga fyri seg, tá HM-kappingin 2006 er av. Við hesum sigur fótbóltsheimurin farvæl við ein spælara, sum hevuur skrivað seg í minnini hjá alskyns fótbóltselskarum**

**HM BÓLKUR G**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

9
Hóast hann í Real Madrid hevur spælt við 5-talinum á rygginum, so er Zinedine Zidane helst tann mest ektaði 10'arin, sum fótbóltsheimurin hevur sæð, síðani Maradona gjørdi um seg í Napoli og á argentinska landsliðnum. Ein spælari, sum stýrir at kalla øllum spælinum hjá sínum liði. Og sum við snarandi driblingum ella djúpum sendingum er maður fyri at toga mest sum hvørja einastu verju í heiminum sundur. Og sum eisini er førur fyri at skjóta tey sublimu málini, sum til dømis framúr heilfluktarin í Champions League finaluni móti Leverkusen í 2002.

**Komu aftur**

Tað var annars als ikki ætlanin, at Zidane skuldi vera við í hesum HM-endaspælinum. Eftir EM í 2004 boðaði hann frá, at hann nú helt tíðina vera komna til at biðja landsliðnum farvæl. Ein støða, sum eisini aðrir stuðlar á liðnum høvdu. Saman við Claude Makelele og Liliam Thuram kom Zidane tó aftur móti endanum av undankappingini.

Sessurin hjá Fraklandi var í vanda. Liðið hevði tørv á royndum spælarum og teirri innspræning, sum eitt nú Zidane kundi geva, og móti Føroyum var sterki tríbólkurin aftur á liðnum, sum eftirfylgjandi vann altavgerandi dystin í Dublin við einum máli frá Thierry Henry.

Og eingin ivi er um, at teir tríggir »afturvendu musketerarnir« eru ein sentralur partur av fronsku HM-vónini. Spurningurin er bara, um teir framvegis orka at toga seg upp á hæddirnar, sum seinasta partin av seinastu øld lyftu Frakland upp á støðuna sum heimsins sterkasta fótbóltstjóð.

Tað kann telja rætta vegin, at motivatiónin framvegis er í toppi hjá teimum. Ikki minst hjá Zidane, sum púrasta gevst við fótbóltinum eftir HM. Men motivatión í sjálvum sær er kanska ikki nóg mikið.

Tað eru tó eisini aðrir spælarar enn omanfyrinevndu tríggir, sum kunnu gera um seg hjá Fraklandi. Í Henry og Trezeguet hevur landið eina álopsduo í absoluttum heimsflokki. Og hóast tað sjálvandi er dyggur smeitur, at Cissé breyt sær beinið í seinastu fyrireikingunum til HM, so nýtist hetta ikki at vera nøkur vanlukka. Serstakliga ikki, tá Raymond Domenech hevur ein mann sum Ludovic Giuly úr Barcelona at taka til sum eykamann.

Á miðvøllinum syrgir Vieira saman við Makelela fyri defensiva partinum, og í verjuni borga menn sum Gallas og Sagnol saman við Thuram fyri altjóða flokki.

So tað er avgjørt ikki nakað vánaligt lið, sum Frakland sendir á vøllin. Langt ífrá. Men onkursvegna tykist tað, sum skal rættiliga nógv ganga upp í eina hægri eind, um Frakland aftur skal finna leiðina móti ovastu tindunum.